TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Skrivstovufólk



**Kollafjarðar skúli**
Botnavegi 2
410 Kollafirði

Í Kollafjarðar skúla ganga 124 næmingar í 1. - 8. flokki.

Komandi skúlaár verður eisini 9. flokkur.

13 lærarar starvast í skúlanum.

- onnur leys størv? Hyggið á www.torshavn.fo

Tórshavnar kommuna søkir eftir skrivstovufólki til Kollafjarðar skúla.

**Arbeiðið**
fevnir um vanligt skrivstovuarbeiði, og fer fram í neyvum samstarvi við skúlans leiðslu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er 10 tímar um vikuna, og verður sett skjótast gjørligt. Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar**
um starvið fáast við at venda sær til Karina Hammer, skúlaleiðara á tlf. 421475 ella Jákup Simonsen, mentamálaleiðara á tlf. 302010.

**Umsóknarfreistin**
er fríggjadagin 23. oktober 2005.

**Umsóknir**
við avritum av próvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast:
Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Mentanarstuðul



**Mentanarstuðul**

Tvær ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða mett at hava týdning fyri mentanarlív kommununnar.

www.torshavn.fo

Møguleiki er nú at søkja stuðul frá mentamálanevnd Tórshavnar býráðs. Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðari, tlf. 30 20 10.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavna í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. oktober 2005. Merkið umsóknina "Mentanarstuðul".

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 270,**
P/F Beta, 600 Saltangará.
**Viðtøkur broyttar:**
16.09.2005
**Nýtt hjánavn:**
P/F Handils- & Frystivirkið (P/F Beta)
**Fusión:**
Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. P/F 97, P/F Handils- & Frystivirkið sum samstundis verður strikað.

*Skráseting Føroya*
*tann 06. oktober 2005*

*Kristin Balle*


ShapeWorks™
Independent Distributor

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**



- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit

Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 422367 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800


SETHÚSAMARKNAÐURIN

SetHúsaSølan
Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

NÝTT



**Stykkið: Sethús til sølu**
matr.nr. 237, grundøki 395 m².
Húsini eru bygd í 40'inum, tríggjar hæddir við trimpul, umleið 50 m² hvør hæddin. Eru í góðum standi, høvuðsumvæld í 90'unum. Grundin er lagað upp, timbur yvirtrom klødd við rotfríðum timbri. Sera hugnalig hús, hildin í gomlum stíli, sprossavindeygur, veggirnir innan úr natúrtræ, bjálkar og vakran brenniovn. Sjálvstøðug íbúð í kjallarinum.
Miðhæddin: Gong, køkur,stova,spísistova, spískamar, trappa uppá loftið og niður í kjallarin.
Loftshæddin: Gong, 2 stór kømur og wc/baðstova, trappa upp á hanabandsloftið,sum er innrættað til eitt rúm.
Kjallarin: Gong, køkur/stova í einum, wc/brúsa, fýrrúm.
Húsini standa frítt fyri við sera vøkrum útsýni í allar ættir, stutt gongd til Leynasand, 20 minuttur í bili til Havnina.
**Verða seld um hóskandi boð verður givið**

NÝTT



**Tórshavn: Tvíhús Mækjugøta 9**
matr.nr. 1360q, grundøki 350 m².
Húsini, eru bygd í 1989, stoypt grund, timbur- yvirtrom klødd við rotfríðum timbri.
Tríggjar hæddir við stórum kvisti, íalt uml. 200 m².
Á stovuhæddini er: Durur,gong, køkur, stova, bað/wc og trappa uppá loft. Stór altan frá stovuni.
Á Loftshæddini er: Gong, hjúnarúm, 2 kømur, og wc.
Kjallarin er ikki innrættaður.
Húsini liggja frítt fyri, blindur vegur og gott útsýni.
**Verða seld um nøktandi boð verður givið**



**Tórshavn: Sethús til sølu**
Djóni í Geil gøta 17.
Matr. 647l og 647n, grundøki 370 m² +27 m² vegur.
Húsini eru bygd umleið 1950, eru innrættaði til tríggjar íbúðir + ein kjallara sum er partvís útgrivin.
1.hædd og 2.hædd hvør 84 m²
Á 1.hædd eru tvær íbúðir við egnari inngong: Gong, køkur stova,kamar og wc/baðirúm
2. hædd er ein stór íbúð: Durur gong, køkur, stova, spísistova, 2 kømur, hjúnarrúm og wc/baðirúm.
Takið, oljutangi/fýr og vindeyguni á loftshæddini eru skift.
Gott útsýni yvir býin og Havnina, húsini liggja tætt við Eysturskúlan og dagstovn og skjótt til gongu oman í miðbýin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**



**Tvøroyri: Sethús til sølu**
matr. nr. 265, grundøki 230 m².
Húsini eru í 3 hæddum á 43 m².
Í stovuhæddini er gong, køkur, stova.
Á loftshæddini er gong við skápum, 2 kømur og baðirúm.
Kjallarin er óinnrættaður.
Húsini eru eini eldri hús, ið liggja á Hvítanesi, gjørd av timbur, klødd og takt við zinki.
Húsini hava gott útsýni, men krevja ábøtur.
**Lægsti prísur kr. 225.000,-**



**Hvalba: Sethús/frítíðarhús til sølu**
Matr. nr. 191a, grundøki 400 m².
Húsini eru bygd fyrst í 1900 talinum, eru uml. 85 m² 3. hæddum.
Stovuhæddin: gong, baðiverðilsi, køkur, stova og trappa uppá loft.
Loftshæddin: 1 kamar og úti á loftinum stór sjónvarpsstova.
Kjallarin: er óinnrættaður. Til húsini hoyrur hjallur.
Húsini eru umvæld av nýggjum í gomlum stíli, vøkur sprossavindeygu, klædningur og tak alt skift. Innan er eisini alt nýtt, nýggjur køkur og nýtt baðiverilsi, sera hugnalig hús sum liggja mitt í bygdini við góðum útsýni. Húsini verða seld við innbúgvi
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**



**Norðragøta: Sethús til sølu**
matr.nr. 142c, grundøki 451 m².
Húsini bygd 1962 í 3. hæddum,kjallari og miðhædd hvør 70 m² loftshæddin 50 m²
Kjallarahædd: Durur, gong, sjónvarpsstova, kamar, goymslurúm og kjallararúm.
Miðhædd: Gong,køkur,stova,vaskirúm og baðirúm.
Loftshæddin: Gong,kamar,hjúnarrúm og klædnarúm.
Garður er rundanum húsini og ein stór terassa niðaneftir út frá miðhæddini.
Húsini eru í besta standi, nýmálaði. Stoypta grund, nýtt alminiums tak og nýggjur timburklædningur, plastikvindeygu.Húsini liggja mitt í bygdini, tætt við kirkjuna og tann gamla býlingin, hava gott og vakurt útsýni í allar ættir.
**Verða seld,um nøktandi boð verður givið**

Sosialurin 341800